LM-053/2025

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest 5. november 2025

Stjórnarskrivstovan

Okkara j.nr.
25/09371-3

Málsviðgeri
Turið Arge Samuelsen

Tygara j.nr.

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
100 Tórshavn

Hoyringsskriv til heimild til kommunur at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli

Stuttur samandráttur av uppskotinum

Yvriskipað er hetta eitt gott og neyðugt stig fyri at økja um trygdina hjá borgarum, serliga í náttarlívinum, har trupulleikar við hóttandi atburði, rúsdrekka og harðskapi hava verið afturvendandi.

Heimildin kann verða eitt virkið amboð til at skapa størri tryggleika og trivnað í býarlívinum, og stuðlar undir samstarvinum millum kommununa og løgregluna um fyribyrging av lógarbrotum.

Tórshavnar kommuna tekur undir við endamálinum við lógaruppskotinum, men mælir til eina víðkan av § 6 a, stk. 3, soleiðis at heimildin eisini fevnir um upptøkur í sambandi við minni álvarslig lógarbrot, sum í roynd og veru eru tey mest vanligu í býarlívinum. Hetta hevði tryggjað, at lógin virkar eftir sínum endamáli um at økja um tryggleika og trivnað í almenna rúminum

.

Viðvíkjandi § 6 a, stk. 3 í lógaruppskotinum

§ 6 a, stk. 3 í lógaruppskotinum ásetur, at:

> *"(...) Upptøkur fevndar av stk 1 kunnu einans gevast víðari til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot.(...)"*

Og í viðmerkingunum í lógaruppskotinum stendur at lesa um § 6 a, stk. 3, at:

> *"(...) Harumframt verður tað í uppskotinum lagt upp til, at tað einans er í teimum førum, tá talan er álvarsom lógarbrot sum politiið kannar, at politiið kann fáa atgongd til upptøkur frá vakmyndatóli, sum eru sett upp sambært § 6 a, stk. 1, í uppskotinum. Við álvarsom lógarbrot meinast við lógarbrot, har revsiramman ikki er undir 3 ár. Talan kann vera um brotsverk ímóti lívi og likami*

(kap. 25 í revsilógini), kynslig brotsverk (kap. 24 í revsilógini) brotsverk ímóti persónliga frælsinum (kap. 26 í revsilógini) og alvandasom brotsverk (kap. 20 í revsilógini)(...)"

Sambært orðingini í uppskotinum kann upptøka frá vakmyndatólum einans gevast víðari til løgregluna, um talan er um álvarsom lógarbrot við revsirammu omanfyri 3 ár.

Hetta kann elva til trupulleikar í verki, tí størsti parturin av teimum tilburðum, sum vakmyndatól eru ætlað at lýsa og fyribyrgja, fellur uttanfyri hesa avmarking. Mest vanligu lógarbrotini í býarlívinum eru einfaldur harðskapur sambært § 244 og burturtøka og herverk sambært § 291 í revsilógini, har revsiramman er undir 3 ár.

Hetta merkir í roynd og veru, at upptøkur, sum hava stóran týdning fyri at kunna uppklára júst tey brotsverk, ið vanliga verða framd í býarlívinum, ikki kunnu latast løgregluni sambært núverandi orðing í lógaruppskotinum.

Hetta kann fáa neiligar avleiðingar fyri bæði tryggleika- og rættarkensluna hjá borgarunum. Vakmyndatól verða sett upp til tess at styrkja um trygdina og trivnaðin í almenna rúminum.

Um upptøkurnar ikki kunnu brúkast í teimum málum, sum borgararnir uppliva sum álvarslig og órógvandi, kann tað skáka álitið millum borgarar, kommunu og løgregluna.

Tórshavnar kommuna mælir tí til, at orðingin í § 6 a, stk. 3, verður víðkað soleiðis, at upptøkur kunnu latast løgregluni í sambandi við øll revsiverd viðurskifti, har tað sambært løgregluni er neyðugt fyri at kanna ella uppklára eitt brotsverk – eisini í førum, har revsiramman er undir 3 ár, eitt nú sambært § 244 og § 291 í revsilógini.

Ein slík tillaging hevði tryggjað, at endamálið við lógini – at økja um trygd og trivnað í náttarlívinum – fær veruliga virknað, og at samstarvið millum kommunu og løgreglu verður styrkt á ein hátt, sum gagnar bæði rættarkensluni og almenna tryggleikanum.

Harafturat stendur í viðmerkingunum til § 6 a, stk. 3, at:

"(...) Um politiið av onkrari orsøk ikki fær atgongd til upptøkur sambært § 6 a, stk. 3, kann politiið sostatt biðja um, at kommunan verður áløgd at útflýggja upptøkurnar sambært rættargangslógini.(...)"

Tað vil siga, at í minni álvarsligum málum (brotsverk fevnd av t.d. § 244 og § 291 í revsilógini), má løgreglan fara umvegis rættargangslógina fyri at fáa upptøkurnar. Tað kann gerast mundandi meira býrokratiskt og virka seinkandi, og tað er ikki vist, at rætturin gevur heimild.

Hetta kundi verið ein haldgóð grundgeving at mæla til, at § 6, stk. 3 verður víðkað, so løgreglan kann fáa upptøkurnar beinleiðis frá kommununi, tá hon metir, at tað er neyðugt fyri at kanna ella avdúka eitt brotsverk – eisini um revsiramman er undir 3 ár. Tað hevði verið meira samsvarandi endamálinum við uppskotinum.

Tórshavnar kommuna tekur undir við endamálinum um at verja persónsupplýsingar, men sum reglurnar eru orðaðar nú, ger tað í roynd og veru tað ómøguligt hjá løgregluni at fáa upptøkur í jást teimum málum, sum eru mest vanlig í náttarlívinum. Harvið verður endamálið um tryggleika og trivnað í almenna rúminum ikki rokkið.

Vinarliga
k.v.

Elsa Berg
borgarstjóri

Jóan Petur Hentze
kommunustjóri